Nývalda bygdaráðið í Nes kommunu:

# Hevur skipað seg og valt nevndir

**Semja var ikki um formansskapin, men kortini er talan um eitt samt bygdaráð sum hevur skipað seg í nevndir og fer til verka, tá ið hetta valskeiðið er úti**

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á almennum bygdaráðsfundi mánakvøldið skipaði nývalda bygdaráðið í Nes kommunu seg.

Semja var ikki um formansskapin. Her var talan um ein minniluta og ein meiriluta. Hinvegin var bygdaráðið samt um skipan av nevndum og umboðsvali annars. Tískil kemur bygdaráðið at arbeiða sum ein eind, hóast semja ikki var um sjálvan formansskapin.

Borgarstjóri verður Símun Johannesen, og Súni í Hjøllum verður varaborgarstjóri. Teir báðir eru teir einastu, sum eru eftir av gamla bygdaráðnum, tá ið nýggja bygdaráðið tekur við leiðsluni, 1. januar 2005.

Nevndirnar vera annars skipaðar soleiðis:

**Fíggjarnevnd:** Símin Johannesen, formaður, Helen H. Jacobsen, næstformaður og Petur í Túni.

**Tekniska nevnd:** Súni í Hjøllum, formaður, Petur Jacob Petersen, næstformaður og Elin á Torkilsheyggi.

**Mentanarnevndin:** Elin á Torkilsheyggi, formaður, Eyðfinn Johannesen, næstformaður og Petur Jacob Petersen.

**Sosiala nevnd**: Petur í Túni, formaður, Helen H. Jacobsen, næstformaður og Eyðfinn Johannesen.

**Bygginevnd fyri skúlan:** Súni í Hjøllum og Petur Jacob Petersen.

**Skúlastýrið:** Súni í Hjøllum og Elin á Torkilsheyggi.

**Valnevnd:** Ólavur Magnussen, Kaj Højgaard, Magnus í Hjøllum, Vilmund Jacobsen og Álvur Højgaard. Varalimir: Jancy Olsen (1. varalimur) og Julianna á Hálvmørk (2. varalimur).

**Skattakærunevnd:** Helen H Jacobsen.

**Skálafjarðar Sløkkilið:** Petur Jacob Petersen.

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim:** Elin á Torkilsheyggi.

**Kongshavnar Havn:** Petur í Túni.

**Heilsumiðstøðin:** Súni í Hjøllum.

**Umboðsnevndin í SEV:** Súni í Hjøllum og Eyðfinn Johannesen.

**Umboð í IRF:** Eyðfinn Johannesen.

**Umboð í Føroya Kommunufelag:** Petur í Túni.

**Bókasavnsnevndin:** Sørin Johannesen, Josefina Johannesen og Asbjørn Vang.

**Barnaverndarnevndin:** Fía í Túni, Torleif Johannesen, Annfríð Nesløð, Kristian Olsen og Oddfríða Højgaard.

Upptøkunevndin í "Vesturskin": Petur í Túni.



*Símun Johannesen verður borgarstjóri*
*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Súni í Hjøllum verður varaborgarstjóri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Breið semja í Fuglafjarðar kommunu



*Nývalda býráðið í Fuglafjarðar kommunu á fundi, har øll umboðini samdust um at skipa seg við formansskapi og nevndarvali. Við borðendan situr Sigurð S. Simonsen, sum eisini verður borgarstjóri eftir 1. januar 2005.*

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nývalda býráðið í Fuglafjarðar kommunu, sum tekur við, 1. januar 2005, hevur skipað seg í semju millum øll umboðini, sum vald vórðu á valinum, 9. november.

Býráðið hevur skipað seg við Sigurði S. Simonsen sum borgarstjóra og Jann Toftegaard sum varaborgarstjóra. Annar varaborgarstjóri er Dánjal Vang.

**Fíggjarnevndin:** Sigurð S. Simonsen, formaður, Elisabeth E. Olsen og Dánjal Vang.

**Sosiala nevnd:** Eyðun á Lakjuni, formaður, Jón N. Olsen og Elisabeth E. Olsen.

**Tekniska nevnd:** Dánjal Vang, formaður, Jón N. Olsen og Petur Abrahamsen.

**Havnanevnd:** Jón N. Olsen, formaður, Tórfríður Abrahamsen og Signar á Brúnni.

**Mentamálanevnd:** Signar á Brúnni, formaður, Jann Toftegaard og Eyðun á Lakjuni.



*Dánjal Vang fekk flestar atkvøður á valinum í Fuglafjarðar kommunu. Hann verður annar varaborgarstjóri, limur í fíggjarnevndini og formaður í teknisku nevnd*

# Stórur kirkjufundur á Toftum

**Komandi sunnudag, sum er seinasti sunnudagur í kirkjuárinum, hittast kirkjuráðslimir, kirkjutænarar og prestar í Eysturoynni á felags kirkjufundi í Fríðrikskirkjuni á Toftum**

KIRKJUFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kirkjufundurin byrjar við almennari gudstænastu við altargongd í Fríðrikskirkjuni klokkan 16. Eftir gudstænastuna verður fundur í Fríðrikskirkjuni fyri kirkjuráðslimum og kirkjutænarum, har Jákup R. Hansen fer at hugleiða um evnið: "Ein hóskandi lestrabók – at lesa lestur í fortíð, nútíð og framtíð." Aftaná fundin verður borðhald í kirkjukjallaranum, har høvi verður hjá luttakarunum at skifta orð um kirkjumál.

Í sambandi við kirkjufundin verður eisini høvi at vitja gamla prestagarðin á Nesi, sum nú er gjørdur til bygdasavn.

Í fjør varð eisini skipað fyri líknandi fundi á Skála. Ætlanin við tílíkum fundum er at umrøða kirkjumál og onnur viðurskifti hjá kirkjuni og at styrkja og menna samstarvið millum tey, sum hava eina tænastu í fólkakirkjuni.

Í Eysturoynni eru 5 prestagjøld, 5 prestar, 14 kirkjur, 2 bønhús og 3 onnur gudstænastustøð. Kirkjuráð er til hvørja kirkju, og minsta tal á kirkjuráðslimum er 6 umframt sóknarpresturin, sum er fastur limur í kirkju-ráðunum í prestagjaldinum.

# »Leiðir Harrans« komin í bókhandlarnar

TÍÐINDASKRIV

Bókadeild KFUMs hevur givið eina nýggja bók við heitinum "Leiðir Harrans", sum Katrin Joensen hevur týtt. Í fleiri ár hevur Katrin Joensen týtt søgur at lesa upp fyri børnum. Nakrar av teimum eru savnaðar í hesi bók. Tær eru einfaldar og lættar at lesa, og fleiri teirra eru eisini hugtakandi lesnaður hjá ungum og vaksnum.

Sum heitið á bókini "Leiðir Harrans" eisini sipar til, so vísa søgurnar okkum á leiðir Harrans og minna okkum á at ganga tær. Permumyndina á bókini hevur Absalon Hansen tikið. Leiðir Harrans er 176 síður og kostar kr. 148, -






# – Ágangurin var øgiligur

**Eftir eina sera buldrasliga viku, har hann mest sum ikki svav í fleiri dagar og var útlúgvaður av beinhørðum politiskum stríði, er Heðin Mortensen positivur og bjartskygdur. Vit hava spurt hann, hvussu hann hevur upplivað seinastu vikuna, og hvat hann í grundini ætlar sær sum borgarstjóri í Havn**

INTERVIEW
*Eyðun Klakstein*



– Onkur annar hevði helst bukkað undir fyri trýstinum.

Soleiðis sigur komandi borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, um dagarnar eftir kommunuvalið í síðstu viku, tá ið hann gjørdist stóra samrøðuevnið í fleiri dagar.

– Tá tú ikki svevur í fleiri dagar, og ágangurin er harður allatíðina, verður tú moyrur, og tá kann verða trupult at halda fast við eina avgerð. Men eg hevði tikið eina støðu, og hana stóð eg við, sigur hann.

Heðin Mortensen tvíheldur um, at tað, sum hann gjørdi eftir valið, var ein roynd at tryggja Sambandsflokkinum størri ávirkan.

– Eg royndi at gera væl, men tað vísti seg, at soleiðis skiltu fólk tað ikki. Tað er harmiligt, at fólk kenna seg snýttan, tí eg royndi bara at smíða, meðan jarnið var heitt, sigur hann.

## Ágangurin var øgiligur

Orsøkin til, at Heðin Mortensen gjørdist mest umtalaði maðurin í landinum í nakrar dagar, hevur verið gjøgnumtugd í fjølmiðlunum í fleiri dagar. Komandi borgarstjórin í Havn hevði sum partur av Sambandsflokkinum gjørt eina avtalu við Fólkaflokkinum um samstarv næstu fýra árini, men hann leyp frá hesi avtalu, tí hann helt hana ikki verið bindandi, og tí Sambandsflokkurin fekk eitt betri tilboð frá hinum flokkunum í býráðnum.

Tá ið Heðin Mortensen hevði gjørt avtalu við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, stóð hann einsamallur, tí hini í Sambandsflokkinum hildu seg til fyrru avtaluna. Og so byrjaði rokið, sum endaði við, at Heðin Mortensen skifti flokk, og næstu fýra árini skal stýra høvuðsstaðnum sum Javnaðarborgarstjóri.

– Dagarnir eftir valið vóru ógvuliga turbulentir, og tann harðasti ágangurin kom frá fólki í mínum egna flokki. Men tað vóru eisini sera nógv fólk, sum søgdu seg stuðla mær, og tað var fløvandi at fáa teldupostar og sms við uppmuntrandi orðum, tí ágangurin var øgiligur, sigur Heðin Mortensen.

– Eg havi verið í onkrari líknandi støðu fyrr, men ikki so ringari, men eg eri komin uppundan aftur, tí eg haldi meg vera ein fightara, og eg gevi ikki upp, tá ið eg havi sett mær nakað fyri.

## Flokkuri gekk aftur

Valið hjá Sambandsflokkunum í høvuðstaðarkommununi var einki serligt. Flokkurin misti atkvøður og ein býráðslim. Haraftur-at var flokkurin ikki so nógvar atkvøður frá at missa ein lim afturat.

Tað var millum annað hetta, sum fekk Heðin Mortensen at handla.

– Um tú hyggur eftir valinum, so misti Sambandsflokkurin ein býráðslim, og av sitandi býráðslimum var tað bara eg, sum fekk fleiri atkvøður. Tí helt eg, at her var okkurt spinnandi galið, og tá eg síðani royndi at tryggja flokkinum størri ávirkan, var tað ein roynd at venda skeivu gongdini hjá flokkinum, sigur Heðin Mortensen.

– Tað var ikki gamalt, at mann lat ein kalva fara aftur við borðinum, og tá eg gjørdi avtaluna við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkinum, var tað ein avtala, sum skuldi umfata allan Sambandsflokkin og ikki bara meg, sigur hann.

## Nógv á skránni

Nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin hevur stungið út í kortið, hvat hon ætlar næstu fýra árini, og nógv er á skránni á øllum økjum. Líka frá eldraøkinum, sum skal raðfestast høgt, til barnaansingina, mentan, ítróttin, havnina og so víðari.

– Ætlanin er, at formenninir í teimum ymsu nevndunum skulu hava betri møguleikar at arbeiða, og teir skulu hava størri ábyrgd. Á tann hátt fáa vit eina betri virkandi kommunu. Tað ræður eisini um, at starvsfólkini kenna seg væl og fáa størri ábyrgd, so vit fáa ein kommunu, sum verður effektivari.

– Vit eru øll positivt innstillað til at fara í gongd, og vit líta á hvønn annan. Vit hava havt gott samstarv higartil, og eg ivist ikki í, at tað fer at halda fram, sigur Heðin Mortensen, sum ikki heldur, at rokið seinastu vikuna fer at ávirka samstarvið í býráðnum í longdini.

– Tíðin lekir øll sár – eisini í politikki. Tí rokni eg við, at tá ið hetta rokið hevur lagt seg eitt sindur, fáa vit eitt gott samstarv í býráðnum. Allir býráðslimirnir vilja jú kommununi væl, sigur Heðin Mortensen.

Hann ljóðar so bjartskygdur, sum hann kann vera, og tað ljóðar eisini, sum hann meinar hvørt orð. Hann sigur seg eisini verða greiðan yvir, at tað nyttar ikki bara at lova, tað skal eisini arbeiðast.

– Mín partur skal ikki liggja eftir, og tá ið borgararnir í Havn um fýra ár sleppa aftur á, tá fáa teir eisini møguleikan at meta um okkara avrik, sigur Heðin Mortensen.

## Vilja skipa seg sum skjótast

Hóast fýra samgonguskjal vórðu gjørd í Tórshavnar kommunu innan nakrar fáar dagar eftir kommunuvalið, og hart stríð var millum flokkar og innanhýsis í Sambandsflokkinum, tykist tað nú verða púra greitt, at avtalan, sum Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin hava gjørt, stendur við makt.

Flokkarnir hava heitt á sitandi borgarstjóra í Havn, Jan Christiansen, um at kalla nýggja býráðið saman, so tað kann skipa seg, og teir ætla at koma við nýggjari áheitan.

– Vit eru klár at fara til arbeiðis, og tað er eingin orsøk við at bíða til síðstu løtu við at skipa nýggja býráðið, sigur Heðin Mortensen.

– Vit hava býtt allar nevndarsessirnar, og tað hevði verið gott fyri bæði okkum og umsitingina, at hetta varð endaliga avgreitt í býráðnum, tí so kundu vit fyrireika okkum til ársskiftið, heldur hann.

## FAKTA

Heðin Mortensen er føddur 7. apríl 1946 í Trongisvági. Kona hansara er Hjørdis Egholm Mortensen. Tey eiga børnini Elin, Ann, Guðrun og Eirikur.

Heðin er útbúgvin maskin- og bilmekanikari, og hann hevur eisini útbúgving sum bilsýnismaður og tryggingarmaður. Hann arbeiddi sum maskin- og bilmekanikari í 17 ár, men síðan 1978 hevur hann arbeitt sum tryggingarmaður hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Hann var fyrstu ferð valdur í Tórshavnar býráð í 1972 og hevur sitið har síðani. Heðin hevur sitið í styttri og longri tíðarskeið í løgtinginum síðani 1989 – bæði sum varalimur og sum valdur løgtingsmaður.

Hann hevur verið virkin í ítrótti og mentan – var millum annað formaður í Havnar Sjónleikarfelag í fleiri ár og hevur verið forseti fyri ÍSF síðani 1980